um at vitna um Jesus, so at nógv kundu verða frelst.

Eg stóð í køkinum og gjørdi teimum drekka. Hurðin stóð opin, so eg hoyrdi, hvat ið tey talaðu um. Eg hoyrdi Elsabet siga: "Vit skulu ikki vera bangin. Vit vita, at menniskju verða ikki frelst uttan við trúgv á Jesus. Hvussu kunnu tey trúgva, um tey ikki hoyra um hann?"

So hoyrdi eg ein drong siga: "Elsabet! Nú mást tú ansa tær. Tú hevur sitið í fangahúsið fyri trúgv tína á Jesus. Tú kann blíva sett føst aftur, ja, tú kann koma at lata lívið". Svarið hjá Elsabet komi eg ongantíð at gloyma, "Á", segði hon, "so komi eg beint heim til Jesus".

Elsabet vitjaði okkum í Føroyum fyri nøkrum árum síðani. Hon vitnaði og greiddi á fleiri møtum frá sínum upplivingum. Hon segði frá teimum stúgvandi fullu kirkjunum í Etiopia og teimum, sum hava liðið fyri Guds navns skuld.

Hjá okkum hava øll tað so gott tímiliga sæð. Eg haldi, at hon saknaði himmallongsulin millum tey trúgvandi. Hesin ger ikki fólk veruleikafjar og óvirkin, sum onkur vil halda. Nei, er hjarta okkara trygt í himlinum, so ganga vit við føstum fetum á jørðini ørindini fyri Jesus.

Elsabet er gift við Samuel, sum arbeiðir sum mekanikari. Tey eiga tríggjar dreingir. Elsabet arbeiðir í kvinnuarbeiðinum hjá Mekane Yesus kirkjuni. Hon vitnar og lærir kvinnurnar um Jesus.

Tey hava eitt trúgvandi heim, sum er tann størsti vitnisburður í heiðinskapinum.

## Maður Gaidu drap hennara barn

Eg kom at kenna Gaidu, orsakað av, at beiggi hennara Eike hevði verið fyri eini skotvanlukku heima. Tá komu tey við honum til sjúkrahúsið í Arba Minch. Tað tók fleiri dagar at bera hann yvir dalar og fjøll í bakandi sól. Tá ið teir komu á ein veg fingu teir steðgað einum lastbili, sum flutti hann seinasta strekki. Hann kom fram meira deyður enn livandi.

Mamman kom fyrst við honum, og tá ið hon noyddist heim aftur, kom fyrst dóttirin Gaida og síðan ein systir hennara, Galti. Tær sluppu at arbeiða á sjúkrahúsinum at vinna sær nøkur oyru. Í frítíðini skiftust tær um at sita hjá beiggjanum.

Tey gjørdust øll kristin og vórðu doypt. Við Eike gekk tað spakuliga framá. Hann kom eisini fyri seg og giftist.

Gaida vaks upp í heidnum umhvørvi. Tá ið hon var smágenta, varð hon lovað burtur til ein mann, sum hon seinni skuldi giftast við. Hann hevði goldið fyri hana, men hon hevði ongantíð sæð hann. Gjaldið var tíggju krukkur av hunangi og geitir og seyðir sum tíðin leið.

Einaferð hon fór at vitja foreldrini, gjørdist hon við barn við einum øðrum manni. Afturkomin til Arba Minch var var hon ógvuliga kedd og vildi einki siga, um onkur spurdi, hvat ið bagdi. Hon tordi ikki at tosa við nakran um hetta.

Stutt eftir rýmdi hon heim aftur til sína heimbygd. Ein dagin hon var úti á akrinum saman við mammuni, komu nakrir ungir menn og rændu hana. Hon skríggjaði og rópti, men einki hjálpti. Tískil varð Gaida noydd til at vera hjá hesum manni, ið stóð aftanfyri ránið. Hann hevði jú keypt hana og átti hana. Seinni, tá ið barnið varð føtt, og maðurin visti, at hann ikki var pápi at tí, kvaldi hann barnið og blakaði tað út í skógina. Hon græt og var heilt ólukkulig, men har var einki at gera. Seinni fingu tey bæði eina dóttir og ein son. Mamma hennara tók sær av soninum. Hetta var hon fegin um, tí tá kom hann undir kristna ávirkan.

Í 1995 var eg aftur og ferðaðist í Etiopia. Gaida hevði frætt, at eg skuldi koma, og hon var komin hendan langa vegin at hitta meg. Hetta var sera kensluborið fyri okkum báðar.

Gaida var nú aftur við barn. Maðurin hevði eina konu frammanundan. Nú hevði hann fingið sær eina triðju, sum enn var smágenta. Maðurin var heidningur og dámdi ikki, at Gaida var vorðin kristin. Hann er deyður aftaná, at vit vóru har.


*Gaida er komin langa leið at vitja Elsu. Her vaska tær klæðir*


*Her verður Eike, beiggi Gaidu, giftur. Gaida stendur vinstrumegin brúðarparið*


*Sangkór í kirkjuni í Arba Minch*